# ri listasnobbar



*Fuglfjarðagentan, sum gjørdist havnakvinna, Lena L. Mohr, hugleiddi um "List og Samskifti"*



*Justinus Eidesgaard slapp umsíðir at vísa sína naknu dámu, sum hann annars má goyma í kjallaranum, tí hon er ov óskikkilig at hava í stovuni*

felagið í sundursorðaðum ungdómum, sjólætnum monnum, grátandi einkjum, faðirleysum børnum og tungum líkfylgjum. Eg sakni myndlistina hjá einsamøllum eldri, sum gerast einsamallari fyri hvønn dag, onkur av teirra javnlíkum doyr frá teimum. Eg sakni myndlistina í vertskapi, í hundasjúku, í sjalousi, í ótrúskapi, tá vekingarrørslurnar ganga sína sigursgongd yvir landið.

Justinus tosaði við stórum armrørslum um listina, sum í veruleikanum bara er ein eftirlíkning av fyrsta listaverkinum av teimum øllum - skapanarsøguni, men hann undraðist og argaðist yvir at føroyingar ongantíð vóru komnir víðari enn til motivini, sum vóru skapt triðja dagin - havi, fjøllini, landslagið.

- Ikki tí, tað í sær sjálvum er nakað galið við landslagslist, hon er bara so ovurumboðað í føroyskari list, at tað hálva hevði verið væl meir enn nokk. Er tað ikki líka við at vera í so nalvaskoðandi, tá føroyingar halda tað vera so frálíkt at hava somu mynd hangandi á vegginum, sum hana teir síggja hvørja ferð, teir kaga út millum gardinurnar í vindeyganum.?

Men gott er, helt Justinus. Um tey, sum eiga málningin, halda hann vera góð list, er hann tað nokk, tí sannleikin um góða list kann ongantíð verða annar enn tín egni, sum góði, gamli Kant so vísiliga segði tað.

...

Eitt ferðsluóhapp á veg til Fuglafjarðar gjørdi, at blaðstjórin á Kvinna, Lena L. Mohr, var eitt sindur seinkað til løtuna í Ribarhúsi. Vónandi skal tað ikki vera neyðugt við einum ferðsluóhappi fyri at fáa okkum at steðga á, hugleiddi Lena, men tað fekk hana at hugsa um, hvussu illa vit í grundini duga at geva okkum stundir til at binda frið eina løtu. Og júst hetta megnar listin - hon krevur av okkum, at vit steðga á og merkja okkara kenslur, steðga á og geva okkum stundir til at smílast, flenna, gráta, hugsa. List fær menniskju reagera, tí er hon kanska fyrst av øllum ein máti, menniskju samskifta við hvønn annan uppá, segði Lena

Við einum starvi sum lýsingarfólk, var tað kanska upplagt, at Lena L. Mohr hevði valt at hugleiða um "List og samskifti", men sjónarhornið hjá Lenu var eitt sindur øðrvísi, enn tað vanliga. Í Lenusa verð er tað list, tá vit lata okkum í okkara yndis cowboybuksir, tá vit hanga júst hasa lampuna upp í stovuni og tá vit prenta vakrar myndir á okkara ferðavinnufaldarar. Vit gera tað, tí tað hevur týdning fyri okkum, og tí vit vilja fortelja nakað serligt um okkum sjálvi og fyri okkum sjálvum.

- Tey flestu av okkum halda kanska, at vit í besta føri brúka ein lítlan part av okkara frítíð uppá list, tá vit fáa tikið okkum saman at lesa eina bók ella fara á eina framsýning. Men í veruleikanum eru vit umgyrd av og brúka list allatíðina og allastaðni í gerandisdegnum. Tí ber tað als ikki til at ímynda sær eina verð, uttan list, segði Lena, sum ikki var sørt errin av at vera uppvaksin í eini bygd, sum í so stóran mun hevur valt at brúka listina og mentanina til at fortelja søguna um seg sjálva.

...

Stúgvandi fulla hølið í Riberhús hetta kvøldið var nokk besta prógvið um, at fuglfirðingar duga hatta við geva listini pláss í gerandisdegnum og ikki minst at rúma henni í øllum hugsandi útgávum. Eisini frá skemtiliga sjónarhorninum hjá Hera Simonsen og hansara prikandi søgum, sum avgjørt ikki vóru fyri smásárar sálir. Spell at tað ikki ber til at endurgeva tær á prenti, tí eins og list og serliga løtan í Fuglafirði týskvøldið, skuldu tær upplivast.



*Skemtarin og postmaðurin, Heri Simonsen, helt tað vera hóskandi hjá sær at hugleiða um post-modernaða list*



*Í Fuglafirði nýtast tey sjáldan at fara av bygdini at finna rætta persónin at seta eitt mentanarkvøld. Aðalstjórin í mentamálaráðnum, Petur Petersen, er sjálvandi fuglfirðingur*